



**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-17.00**
**og sunnudagar kl. 14.00-17.00**
**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo**

## TILTØK JUNI 2004

**Framsýningin "Veiðimentan" er á Etnografisk Museum í Stockholm til 23. september 2004**

**Framsýningin Atlantic Visioner (F) er í Mikkelberg, Suðurslesvig til 04. juli.**

### Fríggjadagur 04. mars

**Kl. 16.00 Felagið fyri Hoyribrekað í Føroyum(FO)**
Evnisdagur. Nordisk Høreskadedes Samarbejdskomité

**Kl. 22.00 Mentanarnáttin 2004 - Summarframsýningin 2004 (FO) - letur upp**
Luttakandi listafólk eru: Aggi Ásgeirsdóttir, myndlist, Anker Mortensen, grafik/myndlist, Annie Heinesen, arkitektur/foto, Jógvan Biskopstø grafik/myndlist, Martin Nolsøe, videoinstallatíón, Svanhild Strøm, tekstil/installatión, Tummas Jákup Thomsen, grafik/installatión og Vígdis Petersen skulptur og glas.

### Leygardagur 05. juni

**Grundlógardagur - húsið er stongt!**

### Mikudagur 09. juni

**Kl. 09.00 Prestafundur (FO)**
Fyrireikari er Marjun Bæk.

### Hósdagur 10. junu

**Prestafundur, framhald**

### Fríggjadagur 11. juni

**Kl. 19.30 Konsert v/GHM (FO) og Odense Senior Blæsere (DK)**

**Mánadagur 14. juni**
**Kl. 18.45 Nordisk Søforsikring (DK)**
Fundur

### Mikudagur 16. juni

**Kl. 19.30 Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag (FO),**
Almennur panelfundur

### Leygardagur 19. juni

**Kl. 19.30 Summartónar 2004 - Konsert við Det Jydske Ensemle (DK)**
Atgongumerki verða seld í Kunningarstovuni í Havn og í Norðurlandahúsinum

### Mikudagur 23. juni

**Kl. 19.30 Summartónar 2004, Aldubáran (FO), konsert**
Atgongumerki verða seld í Kunningarstovuni í Havn og í Norðurlandahúsinum

### Týsdagur 29. juni

**Kl. 19.30 Jazzfestivalur:**
Kl. 19.30 Eivør Pálsdóttir (FO)
Kl. 19.30 Spælimenninir (FO)
Kl. 20.00 Enekk (FO)
Kl. 21.00 Jussi Kannaste Quartet (FI)
Kl. 22.00 New Jungle Orchestra (DK/SE)
Atgongumerki verða seld í Kunningarstovuni í Havn og í Norðurlandahúsinum

### Mikudagur 30. juni

**Kl. 19.30 Konsert v/Torsdagskoret, blandað kór úr Flensborg (DK).**
Atgongumerki eru at fáa í Húsinum

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00**

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo e-mail: nlh@nlh.fo**

# NÝGGJ JAZZFESTIVAL REISIR SEG





**New Jungle Orchestra er ein magnet á Havnar jazzfestival, sum heldur eina av sínum konsertum í Norðurlandahúsinum. Finski Jussi Kannasti og okkara egnu spælimenn, Eivør og Enekk vera eisini við tann 29. juni**

Í tjúgu ár stóð navnframi Brandur Øssurson á odda fyri Tórshavnar Jazz-, fólka- og bluesfestival. Í fjør takkaði hann fyri seg, men í ár reisir ein nýggj festival seg úr øskuni við nýggjum búmerki, nýggjum fyrireikarum og nýggjum navni: Havnar Jazzfestival.

Skráin er øðrvísi enn á jazzfestivalum flest. Her er eitt sindur av hvørjum: Diskotónleikur, vísusangur, fólkatónleikur, popp og rullandi rockur. Áður var Norðurlandahúsið karmur um festivalina, men í ár er Havnin øll skrýdd í festbúna.

## Um allan býin

Konsertirnar eru á ymsum støðum. Høvuðskonsertirnar eru í Sjónleikarhúsinum, tvær konsertir verða í Listaskálanum, og ein verður í Norðurlandahúsinum.

Havnar Jazzfestival varir í eina viku, frá mánadegnum 28. juni til sunnudagin 4. juli. Konsertin í Norðurlandahúsinum verður týsdagin tann 29. juni. Tá spæla Eivør, Enekk og Spælimenninir úr Føroyum, Jussi Kannasti Quartet úr Finnlandi og New Jungle Orchestra mannað við tónleikarum úr Danmark og Svøríki.

Hetta eru øll nøvn, ið borga fyri góðum konsertum.

Spælimenninir seta lív í, Enekk setir lívið í perspektiv, og Eivør er sjálvt lívið.

Finski Jussi Kannasti er ein úrmælingur á saxofonini, og New Jungle Orchestra er eitt av allarbestu jazzbólkunum í øllum Evropa.

## Jazzur í serflokki

Vert er at dvølja við New Jungle Orchestra. Hesin bólkurin við Pierre Dørge á odda, hevur spælt síðan 1980 við nøkrum broytinum í manningini ávegis. Tey spæla heimstónleik á hægsta stigi og eru í serflokki, siga jazzkøn.

Tónleikurin er eitt blend av jazzi, asiatiskum, afrikonskum og evropeiskum tónleiki - og ørskapi yvirhøvur, leggja tey sjálv afturat. Tey skapa sítt egna univers, sum gevur áskoðarum eina bæði komiska og kosmiska uppliving.

Bólkurin er best á palli, saxofonin spælir ein týðandi leiklut, og tey eru eyðkend fyri sína nýtslu av alskyns hjálparamboðum. Ein spælidós sum soloinstrument, ein gágguskel nýtt sum trompet og afrikonsk ella asiatisk ljóðbrongl slóða fyri, at konsertirnar gerast ógloymandi.

Síðstu árini hevur New Jungle Orchestra spælt um allan heimin: New York, Buenos Aires, Singapore, Rom, Hamburg, Amsterdam, Bratislava, Lissabon, Athen, Warszawa, Madrid og Sydney eru bara nøkur úr rúgvuni. Og nú ríka tey ta fyrstu Havnar Jazzfestival.

# NÚ BYRJAR ATGONGUMERKJASØLAN RÆTTILIGA

Listastevnan nærkast. Byrjað varð longu 1. mars at selja til ávís tiltøk, men 1. juni byrjar atgongumerkjasølan til restina av álvara.

Umframt tey heilt stóru nøvnini á ársins Listastevnu er nógv annað spennandi á skránni.

Jostein Gaarder, norskur barna- og ungdómsrithøvundur, lesur og svarar spurningum í Norðurlandahúsinum sunnudagin 8. august. Vertur er Ivan Niclasen, og Jostein Gaarder sjálvur og Laura Joensen lesa. Kostnaðurin er 125 krónur.

Sama dag verður kórsangur í Húsinum við Rilke Ensemble úr Gøteborg. Tey syngja bæði upprunaføroyskan tónleik eftir yrkingum hjá William Heinesen og norðurlendskar sangir.

Tbilisi Municipal Theatre fara við marionettdukkum at framføra "The Battle of Stalingrad" á Meiarínum týsdagin 10. august kl. 19:30 og mikudagin 11. august kl. 19.30. Tá verður kostnaðurin 150 kr.

Mánadagin 9. august verður av sonnum ein familjusýning, tá ið Ambrossia, sum er eitt sápubløðrusirkus úr Spaniu, sýnir fram. Framsýningin verður í Norðurlandahúsinum klokkan 19.30, og kostnaðurin er 125 kr fyri børn og 175 kr fyri vaksin.

Fiddlers' Bid er navnið á fingrafimum hetlendskum fólkatónleikarum, sum hava konsertir í Mentanarhúsinum í Fuglafirði 12. august og á Platform í Havn. Kostnaður: 225 krónur.

Eivør sleppur rættiliga at royna seg í einari írskari, íslendskari og føroyskari tónleikaframførslu í Norðurlandahúsinum sunnudagin 15. august kl. 19.30. Kostnaður 375 krónur.

Lesið meira á heimasíðuni listastevnan.com.

**Det Jydske Ensemble og Aldubáran fara 19. og 23. juni at framføra kompositiónir eftir m.a Sunleif Rasmussen og Kristian Blak**



# FØROYSKIR TÓNASMIÐIR Í SUMMARSKRÚÐ

**Summartónar:** Aftur í ár verður klassiskur tónleikur eftir føroyskar tónasmiðir spældur á hásumri. Bæði Det Jydske Ensemble og Aldubáran framføra nýggjan føroyskan tónleik

Tónleikur eftir Kristian Blak og Sunnleif Rasmussen er á skránni, tá ið Det Jydske Ensemble vitjar í Norðurlandahúsinum leygardagin 19. juni. Sunleif Rasmussen hevur skrivað "Four Gardens" serliga til Det Jydske Ensemble, sum eisini spæla stykkini "Vienna la Nuit" og "Hogboy for otte instrumenter" eftir Kristian Blak. Harafturat spælir Det Jydske Ensemble Kvintett í g-mol opus 39 eftir Sergey Profokiev (1891-1953).

Det Jydske Ensemble er mannað við yrkistónleikarum við klassiskari útbúgving. Ljómliðið hevur útgivið seks fløgur, og konsertirnar fáa góða sera góð ummæli. Tónleikararnir njóta at spæla, eru samanspældir og konsertirnar eru eitt upplivilsi fyri bæði eygu og oyru, verður sagt. Ljóðførini eru tey klassisku, og alt eftir hvørji stykki verða spæld, og hvør er við á konsertunum, eru tey floyta, obo, klarinet, horn, fagot, klaver, violin, bratch og cello.

Sum vant spælir Aldubáran eisini á Summartónum í ár, tann 23. juni. Aldubáran fleiri føroysk, og teirra millum er ein frumframførsla. Tað er Horntrio eftir Atla Petersen. Harafturat spæli Aldubáran "Preludium og Marsjur" eftir Kára Bæk, "Dancing raindrops" eftir Sunleif Rasmussen, "Oktett" eftir Igor Stravinsky og at enda "Skýrák" eftir Atla Petersen. Bernharður Wilkinson stjórnar.

Aldubáran varð stovnað í 1995 av sjey ungum, føroyskum tónleikarum. Síðan er bólkurin vaksin til níggju limir, sum spæla floytu, klarinet, fagott, trompet, trombon, violin, bratch, cello, guitar og klaver. Tað gevur nógvar møguligar samansetingar. Aldubáran spælir ofta nýggjan føroyskan tónleik, men klassisk útlendsk verk eru eisini ein fastur táttur á skránni.

Summartónar hava tólv ár á baki, og er tónleikastevnan fyri føroyskar tónasmiðir. Síðan 1992 hava Summartónar verið ein pallur fyri klassiskan tónleik og samtíðartónleik í Føroyum. Kjarnan av tiltøkum eru í Norðurlandahúsinum á hásumri, men Summartónar skipa samstundis fyri konsertum í kirkjum, á slupp, í gjógvum og øðrum náttúrukonsertsalum.

Summartónar hava ein avgerandi týdning fyri føroyska kompositión, við tað at tónleikastevnan gevur fólkum møguleika at hoyra føroyskan tónleik framført av útlendskum ljómliðum og solistum eins væl og føroyskum.

Konsertin við Det Jydske Ensemble verður í Salinum í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið 19. juni klokkan 19.30. Aldubáran spælir mikukvøldið 23. juni klokkan 19.30. Atgongumerki eru at fáa á Kunningarstovuni og í Norðurlandahúsinum.

# MARGFELD SUMMARFRAMSÝNING



Á Summarframsýningini síggjast verk eftir ung føroysk listafólk, ið arbeiða við ymiskum lista- og námsgreinum

Á fjórðu mentanarnáttini tann 4. juni, letur Havnin allar dyr á víðan vegg. Hetta sama kvøldið letur Norðurlandahúsið ársins Summarframsýning upp klokkan 22.00. Á framsýningini verða fleiri av teimum spennandi ungu føroysku talentunum, kend og minni kend, við eitt nú myndlist, installatiónum, video- og teldulist.

Framsýningin hevur undirheiti "Føroysk list í globalum rúmi". Dentur verður lagdur á, at nútíðar list arbeiðir ikki bara við sjónsansinum men við øllum sansum í senn. Framsýningin vísir, at listafólkini ikki eru fjøtrað av vanabundnum loysnum, men leita sær ávirkan uttan fyri egin listaøki við eitt nú at brúka elektronisk amboð og at blanda saman ymsar listarligar málburðir.

Luttakandi listafólkini arbeiða við ymiskum námsgreinum, sum tey seta saman. Eitt nú hava Annie Heinesen og Vígdis Petersen arbeitt við einari felags verkætlan, har tær skoyta saman myndatøku, kunningartøkni, høggmynd og byggilist. Við at taka myndir av byggilist og seta tað saman við høggmyndum fæst ein nýggjur samanhangur.

Á framsýningini vera hesi listafólk at síggja við nýggjum verkum:

**Aggi Ásgeirsdóttir**
(myndlist)

**Anker Mortensen**
(grafik/myndlist)

**Annie Heinesen**
(fotografi/arkitektur)

**Jógvan Biskupstø**
(tegning/formgivning)

**Svanhild Strøm**
(tekstil/installatión)

**Tommy Láadal Jensen**
(myndlist/installatión/video)

**Tummas Jákup Thomsen**
(installatión/myndlist)

**Vígdis Petersen**
(skulptur/KT)

Framsýningin byrjar Mentanarnáttina 4. juni klokkan 22 og endar ólavsøkudag.

# KIRI TE KANAWA NÆRKAST FULLUM HÚSI

Størsta navnið á Listastevnuni hevur selt væl hóast høga kostnaðin. Jethro Tull er útselt, og bæði Teitur og Celtic Tenors ganga væl

Tað vakti ans, tá ið Listastevnan kunngjørdi, at atgongumerkini til heimsgitnu operasangarinnuna, Kiri Te Kanawa, kostaðu 950 krónur. Tað er prísurin fyri at fáa so stór nøvn hendan vegin, søgdu fyrireikararnir, sum samstundis vóru sera spentir um, hvussu føroyingar fóru at taka ímóti hesum.

Nú kann staðfestast, at Kiri Te Kanawa helst syngur fyri fullum Húsi. Atgongumerkini eru farin javnt og samt um diskin í Norðurlandahúsinum, síðan farið varð at selja 1. apríl, og nú skulu fólk, sum ivast at fara, taka avgerðina, tí einans 100 atgongumerki eru eftir.

Kiri Te Kanawa er heldur ikki hvør sum helst. Hon er høvuðsnavn á plakatuni, hvar hon so syngur, og verður mett at vera heimsins dugnaligasti operasangari í dag.

Útselt er til hitt heimsnavnið hesaferð, sum er Jethro Tull, so tann kjansurin er farin.

Teitur Lassen og Celtic Tenors, ið eisini eru kendir aðrastaðni enn í sínum heimlandi, hava higartil selt um tey 100 atgongumerkini síðan 1. apríl, so har er framvegis gjørligt at fáa góð pláss.

# TANN DEILIGA HAVN - ÆTLAN ELLA TILVILD

Býráðsval er fyri framman og nógv verður at skifta orð um, til krossurin skal setast. Longu í juni verður hol sett á ein part av tí, sum hevur við høvuðstaðnum at gera, tí tá verður almennur fundur í Norðurlandahúsinum um viðurskiftini í Havn.

Undir yvirskriftini "Áh, tann deiliga Havn - ætlan ella tilvild" verðir fundurin skipaður við fýra evnum. Tey eru vinnulív og samferðsla, heilsa og røkt, mentan og menning, umhvørvi og trivnaður.

Tónleikur og undirhald verða eisini á skránni. Fyriskipari er Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag og meira fæst at vita um tiltakið á www.tjodveldi.fo

# KÓR OG HORNTÓNLEIKUR ÚR DANMARK

Kór og horntónleikur úr Danmark verður at hoyra í Norðurlandahúsinum í juni.

GHM fær vitjan av Odense Senior Blæsere, og tey bæði orkestrini fara saman at hava konsert fríggjadagin tann 11. juni klokkan 19.30.

Síðst í mánaðinum kemur vitjan syðst úr Danmark, tá ið Torsdagskoret, sum er blandað kór úr Flensborg, fer at syngja. Tann konsertin verður mikudagin 30. juni klokkan 19.30.

Atgongumerki til konsertirnar eru at fáa í Húsinum.